

## FØÐINGAR

18. febr. fingu Olina Olsen og Claus Boesgaard, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3864 gr.

19. febr. fingu Joan Skaalum og Oddur Augustinussen, Vági, eina dóttur á Ríkissjúkrahúsinum. Hon var 46 cm long og vigaði 2395 gr.

24. febr. fingu Alma Nielsen og Michal Johanson, Sønderborg, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3450 gr.

25. febr. fingu Johild Rasmussen og Bent H. Rasmussen, Syðrugøtu, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigað 4720 gr.

26. febr. fingu Tove Lið Johansen og Martin Haraldsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3800 gr.

26. febr. fingu Halldóra Haasen og Arnstein Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

26. febr. fingu Elsa og Sverri Michaelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4600 gr.

27. febr. fingu Maigunn Danielsen og Eyðun Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3600 gr.

28. febr. fingu Jonika Nysted og Robert Gardar, Hvannasund, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

1. mars fingu Anita Kjærbo, Hvannasund, og Christian G. Mathisen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

2. mars fingu Jenny Gudmundsen, Sandavági, og Evan Hansen, Sørvági, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2825 gr.

2. mars fingu Sólva I. Johansen, Argjum, og Anton K. Højgaard, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

2. mars fingu Henrikka og Victor Nielsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3900 gr.

4. mars fingu Birna og Sunleif Álaberg, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

5. mars fingu Eyðvør og Steinolvur Gudmundsson, Runavík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr.



## ANDLÁT

26. februar

**Semona Christiansen,** ættað av Skála, búsitandi í Reykjavík, 74 ára gomul.

**Oluffa Dahl,** Klaksvík, 90 ára gomul.

27. februar

**Andreas Restorff Jacobsen,** vanliga nevndur Andreas í Vágsbotni, 88 ára gamal.

**Selona Djurhuus,** fødd Weihe, ættað úr Vági, andaðist á Glostrup hospital, 81 ára gomul.

**Ove Djurhuus,** Tvøroyri, 89 ára gamal.

**Kristmar Thomsen,** Tórshavn, 38 ára gamal.

28. februar

**Óli Debes,** Oyri, 79 ára gamal.

**Oddfríður Haraldsen,** Fuglafirði 67 ára gamal.

1. mars

**Jóhanna Fonsdal,** Vestmanna, 90 ára gomul.

**Aksel Olsen,** Hvalba, 39 ára gamal.

4. mars

**Anna Malena Zachariasen,** Norðragøtu, 83 ára gomul.



## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 2. sunnudag í føstu

*Vesturkirkjan:* Kjartan Mørkøre
*Argir:* Bergur D. Joensen
*Vestmanna:* Uni Næs kl 12. Talvan gongur fyri Kirkjuligu Heimamissiónina
*Rituvík:* Jónsvein Bech kl. 11, deyvagudtænasta, altargongd. Talvan gongur fyri Deyvameinigheitina
*Havnar kirkja:* Bjarni Bæk, altargongd, skriftamál kl. 10.40
*Haldarsvík:* Sonja Klein
*Kollafjørður:* Hans J. Joensen, biskupur, kl. 12
*Hósvík:* Marjun Bæk kl. 12, altargongd
*Kvívík:* Martin Restorff Jacobsen kl. 12 og Hans Jacob Joensen, biskupur, kl. 17
*Funningur:* Emil Olsen kl. 12, messa
*Funningsfjørður:* Emil Olsen kl. 19
*Elduvík:* Emil Olsen kl. 20.15
*Sandavágur:* David Johannesen kl. 18
*Sjóvar kirkja:* Jógvan Fríðriksson kl. 12, altargongd
*Miðvágur:* David Johannesen kl. 12
*Viðareiði:* Meinhard Bjartalíð kl. 12
*Christianskirkjan:* Petur Martin Rasmussen kl 11, altarg.
*Árnafjørður:* Niels Pauli Danielsen kl. 12, altargongd
*Kunoy:* Inga Poulsen Dam kl. 20
*Porker:* Heri Joensen kl. 12

### KFUM & KFUK, Tórshavn

Eldrasamkoma v/ Elsu Jacobsen, kristnitrúboða, verður í KFUK mánadagin kl 15.
Øll eru vælkomin til okkara tiltøk og fundir!

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 19: Møti.

### Ebenezer, Tórshavn

Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli. Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti. Sunnukvøld kl. 21: Útimøti.
Mánakvøld kl. 20: Bønamøti.
Mikukvøld kl. 20: Uppbyggingarmøti.
Hóskvøld kl. 20.30: Ungdómsmøti.

### Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl 17: Møti og sunnudagsskúli. Arna Lognberg o.o. úr Skopun luttaka.
Øll eru vælkomin.

### Hvítusunnusamkoman Tórshavn

*Yviri við Strond*
Møti verður sunnumorgunin kl. 11.
Evangeliskt møti verður sunnukvøldið kl. 18. Palla Højgård, Tormóður Joensen o.o. luttaka.

### Frá Kelduni í Skálabotni

Leygarkvøldið kl. 21: Opið hús v/ Jan Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17: Møti v/ Haraldi og Svanhild. Teir 5 úr Hoyvík syngja.
Sunnudagin kl. 17: Barnamøti.

### Elim, Søldarfjørður

Møtitíðir:
Sunnudag kl. 12: Morgunmøti. Sunnudag kl. 12: Sunnudagsskúli. Sunnukvøld kl. 18: Evangeliskt møti.
Mánakvøld kl. 20: Ungdómsløtan.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.

### Felagið fyri Kirkjuráðslimir

Bergur Debes Joensen prestur hevur fyrilestur um evnið Lógin og evangeliið í Gøtu kirkju sunnukvøldið kl. 18.
Øll eru vælkomin.

### Berøa

*Ungdómsmøtini halda fram í Ólastovu í Saltangará*
Leygardag:
Bíbliutími kl. 11.00. Bíbliutími kl. 15.00. Útimøti aftan á bíbliutíman. Evangeliskt møti kl. 19.30. Hugnaløta kl. 22.00.
Sunnudag:
Morgunmøti í Berøa kl. 11. Barnamøti kl. 14.30. Evangeliskt møti kl. 17.00.
Tey, ið ikki vita sær innivist, kunnu ringja til Eydu Poulsen, tlf. 47930, ella Hans Vang, tlf. 47700.

### Samkoman Sion, Vágur

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 73777.

### Hvalbiar Missiónshús

Missiónsvikan heldur fram. Í kvøld kl. 20 menn úr Skopun. Skopunar Sangkór luttekur.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Torleif Johannesen og Skopunar Sangkóri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Onki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hvalba.

### Sjómansheimið »Ørkin«

*Brautarholt 29, 105 Reykjavík*
Sunnudag møti kl. 17.
Mánakvøld bíbliutími kl. 20.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Nærri upplýsingar á tlf. 009 354-568-0777

### Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni

Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovendbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 96 99 95, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

### Sunnudagsskúli í Keypmannahavn

Sunnudagsskúli er hvønn sunnudag kl. 14 á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8, og í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A. Øll eru hjartaliga vælkomin. Nærri fæst at vita frá Jan Johannesen, tlf. 30 35 59 66.

### Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.
Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

### Evangeliska Røddin

Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.



## DAGSINS TEKSTUR

*Epistulin skrivar Jákup ápostul, 5. kap. 13. v. og út.*

Hevur nakar av tykkum tað ringt, tá biði hann; veit nøkrum væl við, tá syngi hann lovsong! Er nakar sjúkur tykkara millum, tá kalli hann til sín hinar elstu av kirkjuliðinum, og teir skulu halda bøn yvir honum og salva hann við olju í Harrans navni; og trúarbønin skal gera hin sjúka frískan, og Harrin skal reisa hann aftur á føtur, og hevur hann gjørt syndir, skulu tær verða honum fyrigivnar. Játtið tí syndirnar hvør fyri øðrum og biðið hvør fyri øðrum, fyri at tit mega verða grøddir. Megnað bøn av rættvísum manni er mikið ment. Elia var maður undir somu korum sum vit; og hann bað ta bøn, at tað ikki skuldi regna, og tað regnaði ikki á jørðina í trý ár og seks mánaðir; og hann bað aftur, og himmalin gav regn, og jørðin bar grøði sína. Brøður mínir, um einhvør tykkara millum villist frá sannleikanum, og einhvør vendir honum aftur, tá skal hann vita, at tann, sum vendir einum syndara frá hansara villa vegi, hann bjargar eini sál frá deyða og fjalir fjøld av syndum.

*Hetta heilaga evangeliið skrivar Markus evangelistur, 9. kap. 17.-29. v.*

Og ein úr fjøldini svaraði honum: »Meistari, eg kom higar til tín við syni mínum, sum hevur ein málleysan anda; og hvar hann so kemur á hann, syftir hann hann niður, og froðan veður um munnin á honum, og hann grístar tenn, og hann kemur burtur í einki. Og eg segði við lærusveinar tínar, at teir skuldu reka hann út; men teir vóru ikki førir fyri tí«. Men hann svaraði teimum og segði: »O, tú vantrúna slekt! Hvussu leingi skal eg verða hjá tykkum? Hvussu leingi skal eg tola tykkum? Førið hann til mín!« Og teir førdu hann til hansara. Og við tað sama hann sá hann, sleit andin í hann, og hann fell niður til jarðar og lá og veltist, og froðan vóð um munnin. Og hann spurdi faðir hansara: »Hvussu langt er tað síðan, hetta kom á hann?« Men hann segði: »Frá barnaárunum. Og ofta hevur hann kastað hann bæði í eld og vatn fyri at forkoma honum; men um tú ert nakað mentur, tá miskunna okkum og hjálp okkum«. Men Jesus segði við hann: »Um tú ert mentur! Alt er møguligt fyri honum, sum trýr«. Í stundin skar barnsins faðir í róp og segði grátandi: »Eg trúgvi; hjálp tú vantrúgv míni!« Men tá ið Jesus sá, at mannamúgvan tyrptist samanum, hóttaði hann at hinum óreina andanum og segði við hann: Tú málleysi andi og deyvi! Eg bjóði tær, far út úr honum og far ikki meira inn í hann!« Tá rópaði hann og sleit ógvuliga í hann og fór út; og hann varð sum eitt deytt, so at flest øll søgd, at hann var deyður. Men Jesus tók í hondina á honum og reisti hann upp, og hann reis á føtur. Og tá ið hann var komin til húsa, spurdu lærusveinar hansara hann einsæris: »Hvussu bar tað til, at vit ikki vóru førir fyri at reka hann út?« Og hann segði við teir: »Hetta slagið fer ikki út við nøkrum uttan við bøn og føstu«.